TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðsstovu við 22 børnum, í Býlingshúsinum á Norðasta Horni. Talan er um 40 tíma pedagogstarv.

Starvið verður sett 1. februar 2002, ella eftir nærri avtalu.

Á stovninum eru vøggustova við 11 børnum og tvær barnagarðsstovur,ein við 22 børnum og ein við 18 børnum.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

Tann, ið settur verður, kemur at starvast saman við einum pedagogi og einum hjálparfólki.

**Vit ynskja**
- at tær dámar at vera uttandura í øllum veðri,
- at tú megnar at skapa ein tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

**Setunarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í avmarkað tíðarskeið.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Óla Midjord, leiðara tlf. 310905, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsókn**
umsókn, saman við upplýsingum um royndir og prógvi skulu sendast til Býlingshúsið á Norðasta Horni, Granagøta 5, 100

SNARSKIVAN

# CAFÉ NATÚR
## LOFTIÐ

**Aftaná vit nú hava umvælt Café Natúr, hava vit roynt at betra um umstøðurnar á loftinum, soleiðis at tit til eina og hvørja tíð kunnu hugna tykkum á loftinum, dag sum kvøld. Har er nú betri pláss, fleiri stór borð, har upp til átta fólk kunnu sita saman í senn.**
**Vit vilja ynskja viðskiftafólkum okkara hjartaliga vælkomnum uppá loftið.**
**Og biðja tykkum hava gott tol - vit vita at har er ov nógvur roykur og ring luft inni á Café'ini og fara nú at fáa okkum størri og betri ventilatiónsskipan.**

**Vinarliga Café Natúr** **Tlf. 31 26 25**

# Vestmanna Timburhandil skiftir eigarar

Undirritaðu vilja við hesum siga frá, at vit hava selt P/F Vestmanna Timburhandil.

Nýggju eigararnir eru:

**Óli Hansen, Tórshavn**
**Regin Joensen, Argir**

Vit ynskja Óla og Regin góða eydnu við rækstrinum framyvir.

Somuleiðis takka vit øllum okkara trúgvu kundum og viðskiftafólki fyri góðan samstarv og gott vinarlag hesi 44 árini, sum vit hava rikið timburhandilin.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Jákup og Símun Hansen**



Øllum okkara kundum og viðskiftafólki ynskja vit eini gleðilig jól og gott nýggjár. Við takk fyri gott samstarv í farna ári.

**ABS-Transport**



Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólki eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri samstarvið í brátt farna ári.

**pf Klement Petersen**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Laboratoriið

á Landssjúkrahúsinum er stongt frá **21. des. til 2. januar 2002**.

**Landssjúkrahúsið**

# Vøruvognur til sølu

VW Transporter TT 4 - koyrt 65.000 km. til sølu fyri 85.000 kr.

**Tlf. 315122/215122**

**Seinasta freist at lata lýsingar inn til leygardags-blaðið 22/12 er hósdagin 20. desember kl.15.00 Freistin at bíleggja litlýsingar ella lýsingar, sum eyka-arbeiði stendst av, er kl. 14.00**

**Sosialurin**

**veitst tú ikki tað?**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3281
Navn: Sp/f Camelot
Adressa: Spógvavegur 57, 100 Tórshvn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 28.11.2001
Viðtøkudato: 28.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Óla-Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn og Sp/f Baldur, Spógvavegur 57, 100 Tórshavn (Sp/f 2680).
Nevnd: Johan Mortensen, Spógvavegur 57, 100 Tórshavn (formaður) og Óla-Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn.
Stjórn: Óla-Svenn Nolsøe, Blankagøta 11, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 28.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga partabrøv, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. desember 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3282
Navn: Sp/f Búhús
Adressa: Smærugøta 15, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 13.12.2001
Viðtøkudato: 13.12.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Kristian Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn og Kristianna Michelsen, Garðstún 1, 160 Argjum.
Nevnd: Kristianna Michelsen, Garðstún 1, 160 Argjum (formaður), Kristian Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn og Ebbe Michelsen, Garðstún 1, 160 Argir.
Stjórn: Kristian Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum, nevndarformanninum ella av allari nevndini í felag.
Grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 13.12.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er húsabygging, keyp, søla útleigan og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. desember 2001

Kristin Balle



STARV sosialurin

# Sosialinum tørvar blaðfólk

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi, og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur, so er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Okkum tørvar blaðfólk, og vit bjóða eitt hendingaríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Seinastu tíðina hava vit økt um virksemi við at skriva tíðindi til www.portal.fo. Hetta hevur eisini ført til økt krøv til redaktiónina, men er eisini við til at menna tíðindaflutningin, sum støðugt verður dagførdur á internetinum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna, umframt støðugu tíðindi á internetinum.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 8. januar 2002. Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. (GG: Hetta er sama starv, sum varð lýst leyst síðstu viku í november. Eftir áheitan er freistin longd)

# Avgreiðslutíðir á Almannastovuni um jólini

Dagarnar 27. og 28. desember 2001 eru allar deildir hjá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðini stongdar.

Tó kann bráðfeingishjálp fáast um telefonina báðar dagar millum kl. 10.00 og 12.00.

**Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin**

# Almennir fundir hjá Leirvíkar Bygdarráð í 2002

**Fundirnir eru kl. 19.30 í bygdarráðshúsinum**

mánadagin 14. januar
mánadagin 11. februar
mánadagin 11. mars
mánadagin 8. apríl
mánadagin 6. mai
mánadagin 3. juni
mánadagin 1. juli
mánadagin 2. september
týsdagin 1. oktober
mánadagin 28. oktober
mánadagin 25. november
mánadagin 16. december

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Kommunuskrivstovan er opin:**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 9 - 12 |
| Týsdag | kl. 9 - 12 |
| Mikudag | kl. 9 - 12 |
| Hósdag | kl. 9 - 12 og kl. 15 - 17 |

Borgarstjórin er at hitta á kommunuskrivstovuni hvønn mánadag og annars eftir avtalu á tlf. 443006.

**Leirvíkar Bygdarráð**

# 2 lærarastørv við Tofta skúla

Vegna farloyvir, verður søkt eftir 2 lærarum til Tofta skúla. Bæði størvini eru tíðaravmarkað:

– frá 7/1-2002 til 28/2-2002 (uml. 2 mðr.)
– frá 7/1-2002 til 30/6-2002 (uml. 6 mðr.)

Bæði størvini eru til fulla tímatalvu. Tann, ið settur verður til starvið fyri 2 mðr., skal hava royndir í svimjiundirvísing, meðan hin skal kunna undirvísa í føroyskum og enskum.

Størvini verða lønt sambæt sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. januar 2002.

Leggið vði ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

# Barnsburðar-avloysari til Menningarstovuna

Vegna barnsburð verður søkt eftir **bókhaldara /skrivstovufólki** til Menningarstovuna.

**Uppgávur:**
1. Bókhald sbrt. FSL-skipanina
2. Journal og postavgreiðsla
3. Móttøka og ymisk málsavgreiðsla
4. Aðrar skrivstovuuppgávur.

**Krøv:**
Vit hugsa okkum, at tú hevur skrivstovuútbúgving og kunnleika til bókhald, best um tú hevur kunnleika til FSL - Fíggjarstýringsskipan Landsins. Starvið krevur kunnleika til EDV á brúkarastøði, ávísan málkunnleika og góð samstarvsevni.

Arbeiðsøkið hjá Menningarstovuni er rættiliga fjølbroytt við nógvum spennandi avbjóðingum.

**Setanartreytir:**
Setanarviðurskiftini eru sbrt. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir:**
Umsóknir verða at senda okkum í seinasta lagi 27. desember 2001. Starvið verður sett 1. januar 2002 við væntaðari starvstíð upp á 8 mánaðir.

Umsóknir skulu sendast til:
**Menningarstovan**
***Faroe Islands Trade Council***
**Bryggjubakki 12**
**Postrúm 259**
**110 Tórshavn.**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kjartan Kristiansen, tlf. 31 30 28.



zarepta

# Um Gud vil verður Bíbliugransking í Zarepta á nýggjárinum

**Evnir:**
Galatiabrævið
Filippibrævið
Estersbók
Krossurin
Dávid

**Tíð:**
Skeiðið byrjar hóskvøldið 27.12.2001
og endar týsdagin 1.1.2002

Aldursmark: 17 ár og eldri.

**Tilmelding:**
Áhugað verða biðin um at tekna seg í góðari tíð á tlf. 312370 - 316519 - 315062